átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*



orðið



*Hesa vikuna:*

**John S. Myllhamar**

**Sanniliga sigi eg tykkum: Um tit ikki venda um og verða eins og børnini, koma tit als ikki inn í himmiríkið (Matt. 18,3)**

Ørindið minnir meg á kensluríka hending í lívi Dostojevskis tey árini, hann sat fangi í sibiriskum fongsli. Hann sigur: Tað var eitt lív, sum ikki var nakað lív, men ein rotin tilvera við neyð og líðingum, - stutt sagt: eitt lív í "Deyðans húsi".

Men ein páskamorgun sluppu fyri eina ferð skyld allir fangarnir í kirkju - undir strongum eftirliti. "Vit vóru, sigur hann, krøktir saman við leinkjum, og merktir við tekni skendsilsins. Vit stóðu allir stúgvaðir saman í ein bólk niðri við kirkjudyrnar. Fólkini, sum komu framvið hildu frástøðu frá okkum, og tú sá ótta og vanvirðing í andliti teirra. Men nærum allir fangarnir bóðu við djúpari virðing; og eftir prædikuna tóku vit allir móti altarins sakramenti.

Men tá ið presturin við kalikinum í hondini, segði orðini: "Harri, so tak tá eisini móti mær, sum tú í Paradís tók móti hinum iðrandi illgerðamanninum", tá kastaðu allir fangarnir, mestsum av sær sjálvum, seg sum ein maður niður á gólvið, so at glintini frá leinkjunum góvu hvøll afturljóð í halgidóminum: Hvør einstakur í flokkinum tók orðini um illgerðarmannin sum sipandi til sín.

Her var nakað av ektaðum barnasinni, tað sum er ríkisgimsteinurin í sinnalagi heimsins: hetta eyðmjúka sinnalagið, ið treytaleyst gongur inn undir dómin og dómsins mannminkan, men sum eisini, júst tí, eigur hetta lyfti frá Jesusi: at tann, sum setur seg sjálvan lágt eins og eitt barn, hann er størstur í himmiríki.

Tað er helst lættari fyri "fangar í leinkjum" - í heila tikið fyri tollarar og syndarar, enn tað er fyri heiðursmenn og teir bestu borgarar í samfelagnum, at gerast ein av hesum smáu!

# Byrja helst missiónsarbeiði í Cambodia



*Fólk í Cambodia gerast alt meiri og meiri andaliga søkjandi. Um fá ár fara kanska føroyingar at byrja missiónsarbeiði í landinum*

**Í hesum døgum eru fýra mans frá Heimamissiónini á vitjan í asiatiska landinum Cambodia. Óhugsandi er ikki, at føroyskir trúboðarar verða sendir hagar um nøkur ár**

Høvuðsstýrið í Heimamissiónini hevur í longri tíð arbeitt við spurninginum um, hvussu arbeiðið við útimissiónini skal skipast í framtíðini.

Tann tíðin, tá trúboðarar vórðu sendir til ymisk lond og til ymisk arbeiði er farin. Ætlanin er nú ístaðin at velja út eitt einstakt land ella eitt einstakt øki í einum landi, og síðani senda trúboðarar hagar.

- Vit vilja fegin seta ljóskastarin á eitt ávíst land, sigur Øssur Kjølbro, sum er missiónsskrivari hjá Heimamissiónini við blaðið Trúboðin.

Við hesum nýggja leistinum vónar hann, at tey kunnu gera eitt langtíðararbeiði í einum missiónslandi, og at arbeiðið ikki dettur niðurfyri, um eitt trúboðarapar gevst í tænastuni.

Hevur ein fleiri pør ella einstaklingar í einum og sama landi, skuldi tað ført við sær nógv størri kunnleika til hetta landið.

- Hetta kundi so eisini skapt eina samleikakenslu til landið, sum missiónshúsini í Føroyum eisini kundu tikið til sín, sigur missiónsskrivarin.

Væntað verður, at ein avgerð verður tikin í hesum málinum í ár.

## Andaligt søkjandi

Í framtíðini fer Heimamissiónin sostatt at miða eftir, at hava færri øki, har ein skal útinna missiónsarbeiðið í.

Leygardagin fóru fýra mans frá Heimamissiónini á eina kanningarferð til Cambodia. Hesir fýra eru umframt Øssur, aðalskrivarin Vagn Foldbo, formaðurin í høvuðsstýrinum Thomas Dam og høvuðsstýrislimurin Alfred Petersen.

Ein av orsøkunum til, at ein júst hevur valt at kanna umstøðurnar í hesum landinum, er tann toymisferðin, sum varð gjørd til landið á sumri í fjør.

Her vóru umboð fyri Heimamissiónina og vitjaðu, og sóu tá ein stóran tørv á missiónsarbeiði í hesum landinum, hvørs høvuðsátrúnaður er buddhisma.

Formaðurin í høvuðsstýrinum, Thomas Dam var sjálvur við á ferðini. Hann greiddi soleiðis frá fyri Trúboðanum:

- Eg havi ongatíð áður upplivað menniskju, sum vóru so opin fyri gleðiboðskapinum. Tað vóru fleiri, sum bóðu saman við okkum til frelsu. Prestarnir søgdu, at teir høvdu upplivað eina stóra broyting seinastu tvey árini, við at tað at fleiri og fleiri gjørdust andaliga søkjandi.

- Eg minnist serliga, hvussu Gud virkaði millum okkum við undrum og við tað, at fleiri vórðu grødd.

Í dag fær ein ikki innferðarloyvi sum trúboðari til Cambodia, og tí senda missiónsfelagsskapir fólk hagar at gera ymisk sløg av hjálpararbeiðum.

Nevnast kann, at Luthersk Mission í Danmark og Normisjon í Noregi eru byrjað í smáum at arbeiða her.

## Fakta

### Cambodia

**Íbúgvar:** 13,8 mió fólk
**Høvuðsstaður:** Ohnom Penh
**Átrúnaður:** Síðani 1986 er buddhisman statsreligión. Ein islamskur minniluti finst í landinum.
**Stjórn:** Parlamentariskt kongadømi síðani 1993. Kongur er Norodom Sihamoni. Forsætisráðharri er Hun Sen, sum er valdur fyri lívstíð.

## Bjóða teim lesandi á KFS-legu

**Kvívík:** Vikuskiftið 22. til 23. februar bjóðar Kristiligt Felag fyri Skúlaungdóm og Studentar til legu fyri næmingar í miðnámsskúlunum í Kvívík. Á leguni verða tríggir áhugaverdir fyrilestrar, har samkomuleiðarin Jógvan Zachariasen tosar um trúarverju, biskupurin Jógvan Fríðriksson um sálarrøkt og Føroya Tele-stjórin Kristian R. Davidsen um yrkisleið. Samskipari í KFS er Heini S. Kristiansen.

## Stuðla pastori í Indien

**Evangeliihúsið:** Í fleiri ár hava limir í samkomuni stuðlað einum pastori, sum arbeiðir í Norður-Indien. Herfyri sendi hesin, pastor Scariah eina heilsan heim til samkomuna í Evangeliihúsinum, har hann greiddi frá nøkrum av tí sum hann og samkoma hansara høvdu gjørt í farna árinum. 2. jóladag vitjaðu tey millum annað í einum øki, har fólk við spitalsku sjúkuni búðu. Tey sungu jólasálmar og góvu teimum eina góða máltíð og teppir í jólagávu, eins og gjørt hevur verið í fleiri.

## 3,5 mió krónur frá deyðsbúgvi

**Noreg:** Tvær systrar í Stavanger testamenteraðu herfyri ognir sínar til norska missiónsfelagsskapin Misjonssambandet. - Hetta er ein av allar størstu gávunum sum vit nakrantíð hava fingið, sigur Hans Kristoffer Goa, sum tekur sær av arvamálum í felagsskapinum. Peningurin fer til missiónsarbeiðið kring heimin. Systrarnar hava sum trúfastar missiónskvinnur gingið til tiltøk hjá Misjonssambandet, og vildu nú stuðla við hesi ovurhonds stóru gávuni.

## Ynskja arbeiði í Hoyvík

**Heimamissiónin:** Í næstum er ætlanin at seta ein arbeiðsbólk, sum skal kanna møguleikarnar fyri einum missiónsarbeiði í Hoyvík. Umhugsaður verður møguleikin fyri at hava sunnudagsskúla, bíbliubólkar og onnur tiltøk í hesum skjóttvaksandi býarpartinum. Arbeiðið verður eftir ætlan skipað saman við landsarbeiðinum hjá Heimamissiónini og Meinigheitshúsinum í Havn.